# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

# Tilnevningin kom óvart á

SIC er í uppskoti til heiðursløn hjá heimsins største óhefta tónleikafelagsskapi. Føroyki rokkbólkurin er nú millum 10 teir seinastu av 46.00 tónleikabólkum

TÓNLEIKUR
Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo



*Eddie Jacobsen, gittarleikari í SIC, er ovurfegin um, at føroyski rokkbólkurin er í uppskoti til heiðursløn hjá Just Plain Folks*

- Tilnevningin prýðir væl og virðiliga um okkara cv. Tað er veruliga ein heiður at verða valdir fram um 46.000 aðrar bólkar.

Føroyski rokkbólkurin SIC er í uppskoti til virðislønina fyri Death Metal tónleik hjá Just Plain Folks, sum er heimsins størsti óhefti tónleikafelagsskapur. Heili 42.000 fløgur og 560.000 løg vóru í uppskoti, áðrenn dómararnir funnu fram til endaligu tilnevningarnar. 10 tónleikabólkar eru eftir í stríðnum um virðislønina.

## Boðini komu tilvildarliga

Fyri einum góðum ári síðan sendi tónleikararnir úr SIC ein teldupost til tónleikafelagsskapin. Teldupostadressan er skift, og tískil komu boðini um tilnevningina tilvildarliga. Føroyski rokkbólkurin hevur ymisk løg og videoupptøkur á síni myspacesíðu, og tað var millum annað orsakað av hesum, at Just Plain Folks valdi føroyingarnir fram um 46.000 aðrar tónleikabólkar.

- Vit møttu Lenu Andersen í býnum, og hon greiddi okkum frá, at vit vóru tilnevndir. Tað kostar okkum nógv at fara til Nashville, men um vit skulu framføra til tiltakið, so fara vit avgjørt, sigur Eddie Jacobsen, gittarspælari í SIC.

Lena Andersen er somuleiðis tilnevnd eina virðislønin. Tað er sum besti kvinnuligi singer/songwriter. Heiðurstiltakið verður í Nashville í USA hin 29. august í ár.

**Hesir bólkar eru í uppskoti til Death Metal heiðursløninina:**

| Tónleikabólkur: | Fløgan: | Tjóðskapur: |
|---|---|---|
| Keratoma | Anathema | USA |
| Blinded Colony | Bedtime Prayers | Svøríki |
| Media Lab | Bleeding Memory | USA |
| Mastifal | Carnivora | Japan |
| Str8jackit | Full Metal Jackit | USA |
| Falling To Pieces | Left To Rust | USA |
| SIC | Pandemonium | Føroyar |
| Rustmine | Self Destruct | USA |
| Gross Misconduct | The Process of Indoctrination | USA |
| Stigma | When Midnigh Strikes! | Italia |

# - Michael Jackson varð myrdur

- Eg steðgi ikki, áðrenn tað er greitt, hvør og hvat tók lívið av beiggja mínum.

Tað sigur La Toya Jackson, systur Michael Jackson í samrøðu við Daily Mail og News of The World. Løgnu umstøðurnar kring deyða Michael Jackson hava tískil fingið eina vend.

- Michael var umgyrdur av einari ørgrynnu av fólki, ið hildu hann burtur frá



familjuni. Vit eru sannførd um, at tað eru fleiri fólk íblandaði. Deyði hansara var ein samansvørjing fyri at fáa hendur á hansara pengum. Hann átti minst virði á eina millión dollarar í tónleikarættindum. Hann greiddi mær frá fyri nøkrum árum síðan, at hann óttaðist, at fólk vóru eftir honum. Øll verða bilsin, tá endaligu úrslitini eru greið, sigur La Toya Jackson, systir Michael Jackson, við Daily Mail og News og The World.

**- barbara**